Álit

í

løgtingsmáli nr. 103/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fjarskifti (Fjarskiftislógin) (Um at leingja sólseturáseting í fjarskiftislógini)

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í vinnumálum, hevur lagt málið fram 6. mai 2026, og eftir 1. viðgerð tann 8. mai 2026 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 11. og 12. mai 2026.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í vinnumálum, Jacob Vestergaard.

§58 a í fjarskiftislógini, ið heimilar Fjarskiftiseftirlitinum at kortleggja og skanna føroyska undirstøðukervið, hevur eina sólseturáseting, ið ger, at hon fer úr gildi 31. mai 2026. Eftir ætlan skuldi nýggja nettrygdarlógin koma í gildi áðrenn hetta, við teimum heimildunum, ið tørvur er á til at halda fram og styrkja arbeiðið hjá landinum við nettrygd.

Arbeiðið við nettrygdarlógini varð nakað seinkað orsakað av, at val varð útskrivað tíðliga í vár, og tí er tørvur á at leingja sólseturásetingina fyri §58 a í fjarskiftislógini, so at arbeiðið við at kortleggja og skanna føroyska undirstøðukervið kann halda fram, til nýggja nettrygdarlógin kemur í gildi. Hetta arbeiðið er í gongd í løtuni, og um sólseturásetingin ikki verður longd, so má arbeiðið steðga.

Soleiðis sum heimurin háttar seg og við teimum ymisku hóttanum á talgilda infrakervið, sum eru frá londum og felagsskapum við tilknýti til ávís lond, hevur tað stóran týdning, at Føroyar eisini hava hóskandi yvirlit yvir og hóskandi amboð til at virka ímóti hesum hóttanum.

Tí hevur tað týdning, at Føroyar hava eina nettrygdarætlan og eina nettrygdarlóg, sum hóskar til føroysk viðurskifti og samstundis megnar at gera okkara samfelag mótstøðuført ímóti álopum, sum koma frá øðrum londum. Hetta eru ítøkiligar støður, sum eru hendar og væl kunnu henda aftur, sum kunnu vera til stóran skaða fyri borgarar, vinnu og myndugleikar í Føroyum.

Vinnunevndin metir, at tað er gott, at avvarðandi landsstýrisfólk gevur sær neyðugu tíðina at gera uppskot til nettrygdarlóg, so hon hóskar væl til føroysk viðurskifti. Men av tí støðuni, sum heimurin er í, so er tað gott, at landsstýrismaðurin hevur upplýst, at uppskot til nettrygdarlóg kemur stutt eftir ólavsøku.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd Vinnunevnd undir við uppskotinum um at leingja sólseturásetingina fyri §58 a í fjarskiftislógini, so fyrireikingin kann gerast liðug, uttan at arbeiðið við kortlegging og skanning, sum er í gongd, nýtist at steðga.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin fingið upplýst, at av tí at talan er um broyting í broytingarlóg, sum er í gildi, er neyðugt er við nøkrum lógartøkniligum broytingum í uppskotinum.

Nevndin setir tískil fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Heitið á lógini verður soljóðandi:
   "**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fjarskifti (Fjarskiftislógin)** (Um at leingja sólseturáseting í fjarskiftislógini)"

2. § 1 verður orðað soleiðis:

   "**§ 1**

   Í løgtingslóg nr. 42 frá 16. mai 2024 um broyting í løgtingslóg um fjarskifti (Fjarskiftislógin) verður § 2, stk. 2 orðað soleiðis:

   "*Stk. 2*. § 58 a, sum ásett í § 1, nr. 5, fer úr gildi 1. juni 2027."

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur nevndin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 15. mai 2026

Ben Arabo formaður	Atli F. Johansen næstformaður	Fía Selma Nielsen
Erhard Joensen	Árni Skaale	Eirikur í Jákupsstovu
	Steffan Klein Poulsen	